

www.oljan.fo

**Jan Müller** 26 - 10 - 2012

# Føroysku oljufeløgini rimmar hál í Bretlandi

Hýrurin er góður hjá teimum báðum føroysku oljufeløgunum, nú bretska stjórnin hevur almannakunngjørt, hvørji oljufeløg hava fingið tillutað nýggj leitiloyvi í bretskum øki í tí 27. útbjóðingarumfarinum. Faroe Petroleum hevur fingið tillutað ikki færri enn sjey nýggj leitiloyvi, har felagið í nøkrum av loyvunum eisini er fyristøðufelag. Atlantic Petroleum hevur fingið tillutað 4 nýggj leitiloyvi. Áhugavert er eisini at býta merki í, at fleiri av loyvunum eru millum Hetland og føroyska markið. Eisini er tað ein stórur sigur fyri oljuleiting á Atlantsmótinum tvs. økinum millum Hetland og Føroyar, at stórur áhugi hevur verið fyri at fáa loyvi at leita eftir olju og gass á hesum leiðum. Og at bretska stjórnin hevur valt at lata nógv nýggj loyvi í júst hesum økinum. Ein kann lættliga siga, at oljufeløgini vísa leiðunum nær føroyska markinum alstóran áhuga. Oljan.fo fer í komandi greinum at gera meira burtur úr loyvunum, sum føroysku oljufeløgini hava fingið tillutað og eisini spennandi gongdini, har altjóða oljufeløg av álvara eru farin at hyggja eftir møguleikum í føroyska nærumhvørvinum. Leiting so tætt upp at markinum kann sum frálíður avgjørt vera við til at skapa áhuga fyri føroyska økinum eisini . Mynd - Tveir fegnir føroyskir oljustjórar í London. Nils Sørensen, stjóri í Faroe Petroleum og Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum.